# Sjálvstýrisflokkurin vil steðga barnaporno á alnótini

**Um Fjarðskiftislógin verður ein forðing fyri, at Føroya Tele kann fara upp í norðurlendska samstarvið til tess at basa barnaporno á netinum, fari eg vegna Sjálvstýrisflokkin at taka málið upp í Løgtinginum, sigur Kári P. Højgaard**

BARNAPORNO
*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*

Føroya Tele upplýsir í fjølmiðlunum, at 300 føroyskar leitingar dagliga eru á barnapornografiskum heimasíðum. Hesin veruleiki verður staðfestur, nú eitt filtur, ið er ment í samstarvi við donsku ríkisløgregluna, fær fram hesi hagtøl úr Føroyum.

Hetta sigur Kári P. Højgaard, løgtingsmaður Sjálvstýrisfloksins.

Hann vísir á, at bæði Dátaeftirlitið og Fjarskiftiseftirlitið hava fremstafingurin á lofti, tí Føroya Tele ger hagtøl yvir hesar skrásetingar. Spurningur verður settur við, um skrásetingin er lóglig vísandi til grein 20 í Fjarðskiftislógini.

Red Barnet samstarvar við ríkisløgregluna um at avdúka ólógligu heimasíðurnar og tey sum vitja hesar. Hetta er ein liður í royndini at bjarga børnum frá ágangi og kynsligari misnýtsu.

Allar góðar kreftir mega samstarva um vernd barnanna, og lítil ivi man vera um, at trupuleikin er eins stórur í Føroyum, sum í grannalondum okkara. Í slíkum álvarsmáli kunnu politikkarar ikki sita hendur í favn og látast sum onki. Barnsins trygd eins og landsins trygd hvílur í okkara hondum, sigur Kári P. Højgaard.

Hann sigur, at um Fjarðskiftislógin verður ein forðing fyri, at Føroya Tele kann fara upp í norðurlendska samstarvið á økinum, fari hann vegna Sjálvstýrisflokkin at taka málið upp í Løgtinginum.



# Sjúklingar við systiskari fibrosu sleppa undan at fara niður

**Føroyskir sjúklingar við systiskari fibrosu sleppa møguliga undan í framtíðini at ferðast til Danmarkar og Ríkissjúkrahúsið til eftirlit.**

EFTIRLIT
*Páll Holm Johannesen*
*Pallurin@hotmail.com*



Tíðindastovan Ritzau skrivaði um vikuskiftið, at Ríkissjúkrahúsið hevur fingið stuðul til eina verkætlan, sum skal kanna møguleikan fyri telemedisinalum viðtalum fyri føroyskar sjúklingar.

Í fyrsta umfari verður hesin møguleiki galdandi fyri føroyskar sjúklingar við systiskari fibrosu.

Telemedisinalar viðtalur er eina metoda, har sjúklingurin møtir upp á sínum lokala sjúkrahúsi og verður kannaður av serfrøðingi á Ríkissjúkrahúsinum í Keypmannahavn gjøgnum eitt videotól við sínum lokala lækna við sína lið.

Verður verkætlanin veruleiki, kunnu føroyskir sjúklingar sleppa undan at ferðast til Danmarkar og Ríkissjúkrahúsið til eftirlit, sum ofta bara tekur 10-15 minuttir, og sum í roynd og veru ikki krevur nakra veruliga fysiska kanning av sjúklingunum. Við hjálp av videotólinum verður møguleiki at fara á Landssjúkrahúsið og fáa sítt eftirlit við hjálp frá serfrøðingi á Ríkissjúkrahúsinum.

Sundhedsstyrelsen í Danmark góðkendi herfyri eina umsókn um 775.000 kr til verkætlanina, sum umframt Landssjúkrahúsið eisini fevnir um Bornholms Centralsygehus, Dronning Ingrids Hospital í Nuuk og IT-Universitetið í Keypmannahavn.

ÚTSØLA • ÚTSØLA • ÚTSØLA
BYRJAR MIKUDAGIN 11. JANUAR
KL. 08.00
HÓPIN AV RESTSTØDDUM TIL NÓGV NIÐURSETTAR PRÍSIR
NB. Týsdagin er stongt
SO SUM:
BRØLAPUR, ULL KR. 20,-
DÝNUJAKKAR KR. 100,-
DADDAN
Á Hálsi - Smyrilsvegur 7 - Tórshavn